# Fyrstu sethúsini í gerð

**Størsta útstykkingin í Føroya søgu sæst nú aftur í landslagnum. Mánakvøldið vórðu fyrstu sethúsini á økinum sett upp í Gortrugøtu**

SETHÚS
*Snorri Brend*
*Myndir: Bárður*



*Pætur Hansen (myndin) rekur Dygdarhús saman við bróðuri sínum Boga M. Hansen. Her er hann í ferð við at rætta av, áðrenn húsini verða sett upp*



*Hesi fyrstu sethúsini í Hoyvíkshaganum Suður eru 88 fermetra stór. Tey verða neyvan standandi leingi einsamøll, tí arbeitt verður allastaðni í grannalagnum við somu endamálum*

**Hoyvíkshagin:** Enn líkist hetta risastóra økið í Hoyvíkshaganum Suður ikki einum bústaðarøki. Men nú verður ikki leingi aftrat, til fólk kann flyta inn í fyrstu húsini.

Mánakvøldið arbeiddi menn frá fyritøkuni »Dygdarhús« við at rigga til uppsetingina av teimum fyrstu húsunum, sum Gunnlaugur Sighvatsson eigur.

Fyrrapartin í gjár vórðu skilaveggir og útveggir settir upp, og seinnapartin skuldi miðhæddin eftir ætlan verða liðug.

Her er talan um eini eini 88 fermetra stórum húsum, sum verða bygd á eitt 300 fermetra stórt grundøki. Hetta er størsta mát, ið loyvt er at byggja á hesum økinum.

Húsini eru 11 ferðir 8 metrar til støddar, og við einum lofti er talan um omanfyri 160 fermetrar í bú-areali.

Henda fyritøkan leggur seg eftir at gera eina liðiliga loysn til kundan, soleiðis at hesin hevur stóra ávirkan á tey lyklakláru húsini og eisini á prísin. Tí kundin hevur sjálvur møguleika at gera ávís arbeiði sjálvur.

### Stutt byggitíð

Arbeiðið uppá hesi fyrstu sethúsini í Hoyvíkshaganum Suður byrjaði fyri einum mánaði síðani.

Eftir at avtalan var undirskrivað, varð tilfarið bílagt úr Danmark, og mánamorgunin kom so alt hetta rúgvusmikla tilfarið til landið á tveimum trailarum.

Eftir varð so hjá monnunum í Dygdarhúsum at seta øll hesi elementini saman til eini sethús, og tað arbeiðið byrjaði so mánadagin.

Gongur sum ætlað kunnu tey fyrstu fólkini flyta inn í hesi húsini um ikki so langa tíð. Sambært heimasíðuni hjá Dygdarhúsum er byggitíðin fyri lyklaklár hús einans fýra mánaðir.

Tá teir eru lidnir við hesi húsini fara teir víðari til næstu uppgávuna, sum er at seta upp eini onnur sethús í Streymnesi.

**FAKTA**

### Framleiðsla av sethúsum

1. Húsini hjá Dygdarhúsum verða gjørt sum elementir, har vindeygu og hurðar verða ísett. Alt hetta verður gjørt inni á eini verksmiðju undir góðskueftirliti. Síðani verða elementini uppsett saman við innveggum, soleiðis at húsini eru vind- og veðurtøtt eftir bert tveimum døgum. Húsini eru klødd við timbri, har klædningurin er grundmálaður frá verksmiðjuni.

2. Kundin hevur møguleika at hjálpa til at byggja. Tað, sum er eftir at gera, kann kundin sjálvur gera, ella hann kann velja onkra arbeiðstøku burturúr. Í hesum sambandi kunnu teir bjóða tilfar til at gera húsini liðug við.

3. Ynskir kundin tað, kunnu teir eisini gera húsini lyklaklár.

# Strangari krøv til bankar og sparikassar

**Føroyskir peningastovnar skulu virka eftir somu treytum sum stórar altjóða fyritøkur. Tað setir størri krøv – men gevur eisini størri yvirskot**

PENINGASTOVNAR
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Strangari krøv til bankar og sparikassar*

Føroyskir peningastovnar fáa við ársbyrjan heilt aðrar treytir at virka eftir. Verandi lóg um »finansiel virksomhed« verður dagførd við kongligari fyriskipan, tá málsøkið er danskt.

Dagføringin er komin til Føroya úr Brússel umvegis Danmark. Lógin merkir munandi harðari treytir fyri føroyskar peningastovnar.

– Vit skulu virka eftir somu treytum sum stórir altjóða peningastovnar, sum eru skrásettir á partabrævamarknaði, sigur Janus Petersen, forstjóri fyri Føroya Banka.

Flestu týðandi broytingarnar hava við roknskapin hjá peningastovnum at gera. Eitt minstakrav verður eisini sett fyri, hvussu nógvur peningur skal til fyri at seta ein peningastovn á stovn.

– Fyri at seta ein peningastovn á stovn skal eginpeningurin vera átta milliónir evrur(uml. Seksti mió. Kr., blðm.), men tríggjar av hesum kunnu nýtast til byrja virksemið við, sigur Durita Eliasen, fulltrúi í Fíggjarmálaráðnum.

Allir føroyskir peningastovnar hava nóg mikið av eginpeninginí sambært nýggju lógini. Tað hevði heldur ikki fingið fylgjur fyri ein av verandi peningastovnum, um so var, tí treytin um eginpening er galdandi fyri nýggjar peningastovnar.

Tað verður danska fíggjareftirlitið, sum framvegis fer at halda eyga við føroysku peningastovnunum og átala stovnarnar, tá eftirlitið metir tað vera neyðugt.

Lógin varð endaliga einmælt samtykt 20. april í ár. Við lógini fylgja ikki færri enn 61 kunngerðir. Lógin kemur í gildi 1. januar 2006, men allar kunngerðirnar verða ikki settar í gildi fyrr enn árið eftir.

### Solvens

Sambandið millum eina váða meting av aktivinum, t.e. ognir og virði hjá peningastovnunum, og skyldurnar verður kallað fyri solvensur. Hesin skal í dag í minsta lagi vera átta prosent. Allir føroysku peningastovnar eru væl omanfyri hetta mark. Í framtíðini skulu peningastovnarnir sjálvir meta um teirra solvenstørv. Fíggjareftirlitið skal góðkenna solvenskrøvini.

Ein váða meting av hvørjum einstøkum viðskiftafólki skal eisini gerast. Og hetta setir eisini krøv til peningastovnarnar.

– Hetta verður gjørt fyri at fáa eina rættvísa mynd av, hvønn váða peningastovnarnir seta sær, sigur Durita Eliasen.

### Ávirkan

Nýggja lógin fær helst størsta ávirkan á Elektron, ið umsitur telduskipanirnar hjá føroysku peningastovnunum.

– Hetta er stórt arbeiði fyri okkum. Vit gera eina skipan til at rokna burturleggingar og váða, og tað krevur nógva tíð, sigur Niels Christian Nolsøe, stjóri fyri Elektron.

Mett verður ikki, at tann vanligi kundin hjá føroysku peningastovnunum fer at merkja tað nógva til dagføringina av lógini. Tað er mest innanhýsis hjá peningastovnunum, at tað fer at merkjast.

– Upp á longri sigt merkir hetta nakað fyri kundan, tí peningastovnar fáa nakrar nýggjar reglugerðir um góðan sið. Men tað merkir ikki tað nógva fyri kundan í fyrstu atløgu, sigur Janus Petersen.

### Størri yvirskot

Dagføringin av lógini merkir eisini, at burturleggingar, t.e. peningur at standa ímóti tapi við, verður skipaður eftir ørðvísi reglum.

– Burturleggingar fella burtur, og heldur verður talan um niðurskrivingar. Tað skal vera staðfest, at talan er um eitt tap, áðrenn niðurskrivingin verður framd, sigur Janus Petersen.

Hetta fer at merkja størri yvirskot til peningastovnarnar í fyrstu atløgu. Eitt nú vildi Suðuroyar Sparikassi kunnað víst á eitt yvirskot fyri fyrstu seks mánaðirnar av árinum, um burturleggingarnar hjá teimum vórðu skipaðar eftir nýggju lógini.

– Eg eri ikki vísur í, at hetta er tann rætti mátin. Føroyski búskapurin er ikki so fjálltáttaður, og kreppur kunnu gera seg galdandi, sum hava stóra ávirkan. Men vit mugu halda okkum til lógina, sigur Janus Petersen